# verri enn tær donsku

| | Hægsta fyritíðarpensión | | Miðal fyritíðarpensjón | | Lægsta fyritíðarpensjón | | Fólkapensjón | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Støk | Gift | Støk | Gift | Støk | Gift | Støk | Gift |
| Danmark | 14.709 | 12.214 | 11.588 | 9.093 | 10.516 | 8.021 | 9.327 | 6.832 |
| Føroyar | 11.538 | 10.125 | 8.390 | 7.729 | 6.118 | 4.874 | 6.713 | 5.282 |
| Munur kr. | 3.171 | 2.089 | 3.198 | 1.364 | 4.398 | 3.147 | 2.614 | 1.550 |
| Munur % | 21,6% | 17,1% | 27,6% | 15,0% | 41,8% | 39,2% | 28,0% | 22,7% |

*Hendan talvan vísir munin á pensjónum í Føroyum og í Danmark. Sum tað sæst, eru føroysku pensjónirnar minst 17% lægri enn tær donsku, men har føroyingar eru ringast fyri, eru pensjónirnar í Føroyum yvir 40% lægri enn í Danmark*



hetta var bara fyri at draga málið út, so at einki skal henda.

– Men feløgini fara at fylgja málinum upp og at koma fram aftur við tí.

### Illa fyri

Ingeborg Vinther vísir annars á, at serstakliga eru fyritíðarpensjónistar í Føroyum við lægstu pensjón, illa fyri.

– Lægsta fyritíðarpensjón í Føroyum er ikki so fræg, at hon kemur upp á fólkapensjónina, tí lægsta fyritíðarpensjón til støk er einans 6.118 krónur um mánaðin og til gift er hon einanas 4.874 krónur um mánaðin.

– Samstundis hava fyritíðarpensjónistar í Føroyum ikki rætt til útgjald úr samhaldsfasta eftirlønargrunninum.

Ingeborg Vinther upplýsti eisini, at danskir myndugleikar hava fyri nógvum árum síðan hækkað pensjónina til lægstu fyritíðarpensjónistar, so at teir nú fáa somu grundarupphædd og somu pensjónsviðbót, sum miðal fyritíðarpensjónistar fáa.

– Í Danmark fáa lægstu fyritíðarpensjónistar harafturat eisini hálva avlamisviðbót, men í Føroyum fáa lægstu avlamispensjónistar onga avlamisviðbót.

Í Danmark fáa allir pensjónistar, bæði fyritíðarpensjónistar, fólkapensjónistar, støk og gift, somu grundarupphædd, sum er 4.648 krónur um mánaðin.

Men í Føroyum verður stórur munur gjørdur á støkum og giftum, har gift fáa munandi lægri grundarupphædd enn støk.

Sí hjáløgdu talvu.

# ...ggingini




## SETHÚS Í KLAKSVÍK TIL SØLU



Sethúsini Heygavegur 1 í Klaksvík, verða hervið lýst til sølu.

Húsini standa høgliga fyri í býnum.

Grundøkið er til víddar 221 m2.

Húsini eru bygd í 1963.

Húsini eru í tveimum hæddum og eru til støddar 54 m2.

Húsini eru innrættað soleiðis: Gongd, køkur, stova, 2 kømur og baðiverilsi við brúsu.

Niðara hæddin er óinnrættað.

Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til

**Heygum & Petersen, adv.**
Bøgøta 1 · 100 Tórshavn
Tlf 35 17 10 · Fax 35 17 11
Teldupost: h-p@h-p.fo



Fróðskaparsetur Føroya

## DÁTUGREVSTUR (Data mining)



**Náttúruvísindadeildin á Fróðskaparsetrinum bjóðar skeið í evnisgreinini dátugrevstri, ið fevnir um ástøði, háttaløg og amboð við tí í hyggju at lýsa møgulig mynstur, broytingar, sambond og frávik í stórum dátumongdum.**

Seinastu árini hevur verið ein vaksandi áhugi fyri at ‘grava’ í tí ørgrynnu av dátum, ið ymsar teldu- og netskipanir skráseta dag og dagliga. Dømi um dátugrevstur eru innan handilsliga øki, har fyritøkur m.a. kunnu bólka kundarnar eftir teirra keypsmynstri og á tann hátt bjóða ymsum kundabólkum málrættaðar tænastur. Innan ymsar vísindagreinir (m.a. bioinformatikk) er eisini stórur tørvur á m.a. at leita í fjøltáttaðum og rúgvusmiklum dátutilfari eftir ávísum eyðkennum ella fyri at staðfesta ella afturvísa eina framsetta hypotesu.

Skeiðið verður skipað við floksundirvísing og sjálvlestri. Fyrilestrar og venjingar verða 10 dagar, einamest fríggjadagar og leygardagar í tíðarskeiðinum 7. apríl – 24. juni 2006.

Próvdømingin (staðið/ikki staðið) byggir á tríggjar kravdar stóruppgávur og eini munnligari framløgu, har støðið verður tikið í einari av stóruppgávunum.

Skeiðið er sett at telja 6 ECTS (námsstig) og verður skipað soleiðis, at skeiðið kann góðskrivast í framhaldslestri innan kunningartøkni á masterstigi.

Til tess at verða tikin upp á skeiðnum skal umsøkjari hava staðið bachelorprógv innan kunningartøkni ella kunna vátta samsvarandi kunnleikastig. Skeiðsgjaldið er 3500 kr.

**Umsóknarfreistin er 30. mars 2006.**

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til samskiparan av skeiðnum Petur Zachariassen á telefon 52 11 47 ella á teldubústaðnum peturz@setur.fo.